

# DÓMSNEVNDARÁLIT

## Hugskotskapping um miðbýarætlan í Fuglafirði

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

14. juni 2024

**Innleiðing**

Fuglafjarðar kommuna, bjóðaði í januar 2024 hesum undangóðkendum ráðgevum at luttaka í hugskotskapping um miðbý í Fuglafirði.

Í dómsnevndini hava sitið 7 fólk, harav 5 eru umboð fyri Fuglafjarðar kommunu og 2 fakdómarar. Hesi eru:

- *Dávur Juul, borgarstjóri*
- *Gudny Vang, býráðslimur*
- *Jóanis Erik Køtlum, kommunustjóri*
- *Lillian Jacobsen, tekniskur leiðari*
- *Rønn Eliasen, mentanarleiðari*
- *Nina A. Arge, arkitektur og fakdómari*
- *Páll Holm Lave, arkitektur og fakdómari*

Skrivari hjá dómsnevndini var Sigurd Justinussen, verkætlanarleiðari frá ÍVF Senit, og kappingarskrivari var Tórálvur Weihe, vegna Arkitektafelag Føroya.

Dómsnevndin var saman dagarnar 4.-5. juni og 11.-14. juni. Á fyrsta fundi skipaði hon seg við Dávur Juul, borgarstjóra, sum formanni.




*Kort frá kappingarskránni, ið sýnir høvuðseindir í miðbýnum*

**Framtíðarinnar miðbýur í Fuglafirði**

Høvuðsendamálið við einari burðardyggari miðbýarætlan fyri Fuglafjørð er at fáa fleiri íbúgvar til býin, tilvitaði um, at her finna tey eitt týðandi og innihaldsríkt lív. Verandi støða er, at vit hava ein bý við framúr spennandi møguleikum - tó við tørvi á eini nýggjari býarskipan, ið skapar nýtt lív, økir trivnaðin, leggur upp til eitt nýtt bústaðarmynstur og skipar ferðsluna á tryggari hátt.

Tað hevur stóran týdning, at uppskotið tekur støði í tørvum og ynskjum hjá borgarum, í visjónum og strategi, sum er løgd fram fyri Fuglafjarðar kommunu, í teimum 17 heimsmálunum hjá ST, og at talan er um eina langtíðar burðadygga menningarætlan, ið økir um trivnaðin og áhugan at búseta seg í Fuglafirði.

Væntað verður, at innkomnu uppskotini, so vítt møguligt, eru í røttum samanhangi, eru beinrakin og kunnu fremjast í verki.

Í kappingarskránni vóru 5 átaksøki, ið dentur serliga varð lagdur á:

- *Tryggari ferðsla*
- *Sambinding*
- *Handils-, tænastu- og vinnulív*
- *Fjølbroytni*
- *Arkitekturpolitikkur*

**Dómsnevndin hevur sambært kappingarskránni havt hesar reglur at ganga eftir:**

Krøv til innlatið tilfar:

Uppskotini skulu í minsta lagi innihalda:

- *Støðumyndir í lutfallinum 1:500, har greitt verður frá, hvussu byggingin verður staðsett og í sambandi við vegakervi og nærumhvørvi. Yvirskipaði kort kunnu vera 1:1000.*
- *Har bygging verður, skulu høvuðstekningar í máti 1:200 við flatmyndum, skurðum og útsíðum veitast.*
- *Rúmligar skitsur uttan og innan, har tað er viðkomandi.*

**Dømingarfyritreytir**

- *Fjøltáttaðan og burðardyggan bústaðarmarknað, harav sosialt blandaði bústaðarøki.*
- *Tryggari og betri skipaði ferðsluviðurskifti.*
  - o *hvussu staðsetingarnar eru í mun til logistikk og undirstøðukervi yvirhøvur – fólk til gongu, á súkklu, bussar, (last)bilar og atkomu- og møguleikar*
  - o *hvussu loysnir eru funnar til til- og frákoyring og parkeringsviðurskifti fyri íbúgvar, starvsfólk, vitjandi, vørukoyring og annað*
- *Hvussu økini eru knýtt saman og skipaði í mun til nær- og býarumhvørvið sum heild.*
- *Hvussu tænastu- og vitanarvinna kann gerast ein integreraður partur av heildini og taka ein samskapandi lut.*

- *Hvussu uppskotið kann verða fjølbroytt og mennandi fyri býin, har ymisku mentanarstovnarnir spæla væl saman og verða málrættaðir við upplivingum og virksemi, sum savnar, mennir og birtir upp undir mentanarliga fatan.*
- *Byggilistarlig dygd við arkitekturi, ið styrkir samleikan í býnum og ávirkar, hvussu vit sansa, uppliva og virka í byggilistarliga umhvørvinum.*
- *Hvussu loysnir samsvara við krøv og ynskir í kappingarskránni.*

**Dømingartilgongdin**

Evni sum m.a. ferðsla, skipan av bygging, býarrúm og -torg, samskipan við gøtuneti hava ført til gevandi og áhugaverdar samrøður. Endamálið er at skipa og menna miðbýin í Fuglafirði, soleiðis at hann verður ein væl vitjaður miðbýardepil og góður staður at búgva í.

Metingin hevur tikið støði í nevndu átaksøkjum, sum yvirskipað eru viðurskifti, har menning og nýskipan er hóskandi.

**1. Tryggari ferðsla**
Ferðin er ov høg og trygdin tí í vanda. Undirstøðukervið er ikki tíðarhóskandi og krevur nýhugsan. Ferðsluviðurskifti eru ein høvuðsavbjóðing í miðbýnum í Fuglafirði, og tí hevur hetta átaksøkið fylt nógv í viðgerðini av uppskotunum.

**2. Sambinding**
Ynskiligt er at fjølbroytta virksemið í miðbýarøkinum, verður bundið betur saman. Bilarnir, sum ráða yvir veganetinum, sleppa ótarnaðir aftur og fram við høgari ferð. Ynskið er, at fólk til gongu, á súkklu og fólk við rørslutarni sleppa ómakaleyst eftir gøtum ímillum hús og øki. Tað merkir, at undirstøðukervið verður dagført við einum betri skipaðum gongugøtuneti.

**3. Handils-, tænastu- og vinnulív**
Verandi handlar í Fuglafirði hava lutfalsliga nógv vitjandi, men við eini miðbýarætlan er lagt upp til at handilsvinnan kann gerast enn meira fjølbroytt. Tað eru avmarkaðir hølismøguleikar til handlar og aðra smávinnu, og ein loysn er at fáa fleiri hølir eftir einari dagførdari høvuðsgøtu og/ella at gagnnýta maritima økið.

**4. Fjølbroytni**
Tá tosa verður um fjølbroytni, verður m.a. meint við bústaðarmynstur, byggilist, sosialt burðardyggar bústaðir til ymiskar samfelagsbólkar, mentanir, hugsjónir og trúarviðurskifti. Fjølbroyttar býareindir og fjølbroyttir bústaðir. Nýggi miðbýurin í Fuglafirði skal vera ein vinarligur býur, har góðar umstøður eru hjá fólki, har lagt verður upp til spæl og uttandura uppihald, har virkað verður fyri integrasjón, og at býurin er innbjóðandi fyri øllum, ið vitja, virka og liva í býnum. Tørvur er á fjølbroyttum bústaðareindum, sum rúma øllum samfelagsbólkum og hava lokkandi felagsøki.

**5. Arkitekturpolitikkur**
Hvussu kann miðbýarætlanin virka fyri einum samleika fyri Fuglafjørð? Hvørji arkitektureyðkenni eru fyri býin, og hvussu kunnu hesi eyðkenni menna samleikan í Fuglafirði ella miðbýnum? Hetta eru subjektivir og fakligir spurningar, sum býráðið

vónar hava týdning í arbeiðnum at fremja uppskotini, soleiðis at Fuglafjørður sæst og kennist aftur í miðbýarætlanini.

**Almennar viðmerkingar hjá dómsnevndini:**

Innkomin eru trý uppskot, við eini ørgrynnu av góðum hugskotum til, hvussu Fuglafjørður kann mennast og útbyggjast. Uppskotini eru sera ymisk, men øll eru orkumikil og nærløgd og er dómsnevndin hugtikin av vavinum á innlatna tilfarinum. Tað sæst aftur í uppskotunum, at kappingarskráin hevur verið lutfalsliga opin í mun til vavið á útbygging, og eru uppskotini tískil ymisk, hvat viðvíkir inntrivum.

**Kappingarskráin hevði hesi 5 átaksøkini:**

**Tryggari Ferðsla:**
Øll trý uppskotini vísa á eina ferðslutillaging á høvuðsvegnum, til tess at tálma ferðsluna við eitt nú álegging og aðrari viðgerð av gøturúminum. Haraftrat arbeiða tey við einari javnfjarðari bleytari ferðsluæðr sunnanfyri núverandi høvuðsveg. Longdin á hesari ferðsluæðr er ymisk í teimum trimum uppskotunum. Tað eina uppskotið vísur á eina visionera framtíðarloysn, og leiðir tungu ferðsluna til vinnuøkið, undir býin, gjøgnum ein nýggjan tunnil. Dómsnevndin saknar enn fleiri kreativar tankar um flyting av tungu ferðsluni frá vinnuøkinum. Tað eina uppskotið leggur áherðslu á at gera bleytar ferðsluleiðir frá miðbýarøkinum og niðan í býin, meðan hini bæði uppskotini í minni mun hava viðgjørt økið omanfyri. Tríggir ymiskir parkeringsleistir verða vístir, frá parkering undir jørð, til parkeringshús og spjaddari parkering kring miðbýin.

**Sambinding:**
Uppskotini vísa ymiskar loysnir til at binda saman ymisku økini í býnum. Til ber at siga, at eina uppskotið skarar framúr á hesum økinum. Tað arbeiðir við at knýta saman miðbý og restina av býnum og øll økini framvið sjóvarmálanum, frá frítíðarøkinum móti vestur til vinnuøkið móti eystur. Eisini arbeiðir tað miðvíst við at sambinda náttúruna við býarrúmini. Tað eina uppskotið arbeiðir við at gera eitt heilt nýtt bústaðarøki, sum er áhugavert, men tó tykist heldur isolerað frá núverandi býi. Triðja uppskotið arbeiðir við einum áhugaverdum ynski um at savna saman býin við at styrkja tann maritima samleikan.

**Handilslív, tænastu og vinnulív:**
Sera stórur munur er á vavinum á øki til handils, tænastu og vinnulív í teimum trimum uppskotunum. Hetta kemst sjálvandi av, at tað ikki varð orðað nakað ynski um støðd á hesum í kappingarskránni, og ber tað tí ikki til at samanlíkna uppskotini í mun til støðd. Tó kann sigast, at tvey av uppskotunum leggja størri dent á at samantvinna bústaðir og smávinnu/handil/tænastuvirksemi.
Tvey av uppskotunum arbeiða í størstan mun við at styrkja handilslívið framvið høvuðsgøtuni, meðan triðja uppskot velur at flyta handilslívið oman um høvuðsvegin og ger eina javnfjara gongugøtu við handlum báðumegin við og við einum nýggjum handils- og kafétorgi sunnanfyri Ribarhús.

**Fjølbroytni:**
Fuglafjørður ynskir at gerast ein meiri fjølbroyttur býur, við áherðslu á inklusjón og

har sambandið millum ymisku mentanardeplarnar verður styrkt. Hetta verður tulkað á ymiskan og kreativan hátt. Dómsnevndin er fegin at síggja nýskapandi hugskot til bilfrítt bústaðarøki, har dentur er lagdur á felagsskap, samveru, lívfrøðiligt margfeldi og burðardygd. Eisini er dómsnevndin fegin at síggja uppskot, ið leggja høvuðsdent á sambandið við náttúruna og burðardygga bústaðarbygging, har dentur er lagdur á at tryggja fjølbroytni í aldursbólkum og stødd av húskjum. Eitt uppskot arbeiðir í størri mun enn hini bæði við at binda saman verandi mentanarvirksemi í býnum og at styrkja hetta. Eitt annað leggur aftrat nýggj og áhugaverd mentanartilboð uttanfyri verandi býarkjarnu.

**Arkitekturpolitikkur:**
Tá ið arbeitt verður strategiskt við burðardygd og samleika er eitt uppskot, ið skarar framúr. Við nærlagni og umhugsni, leggur uppskotið upp til at arbeitt verður við at styrkja verandi eyðkenni fyri Fuglafjørð, bæði hvat viðvíkur býnum og í serligu náttúruøkjunum. Onnur áhugaverd boð eru at styrkja maritima samleikan hjá Fuglafirði ella at geva býnum ein heilt nýggjan samleika, við áherðslu á felagsskap og burðardygd.

# 1. virðisløn, kr. 350.000,00

**Uppskot nummar:** 30684
**Uppskotsstillari:** EYA Arkitektar




Dómsnevndin hevur valt hetta uppskotið sum vinnara, tí uppskotið leggur áherðslu á at menna verandi øki, sum er samsvarandi einum burðardyggum hugsanarhátti – leggur áherðslu á náttúrutrekkini, áirnar og uppruna sjóvarmálan. Uppskotið styrkir um tað verandi og vísir varsemi tá lagt verður til ella bygt verður afturat. Uppskotið er lætt at lesa og greitt sett upp, og tilgongdin til uppskotið er væleydnað. Somuleiðis tekur uppskotið støði í teimum 17 heimsmálunum hjá ST.




Uppskotið dugir væl at samansjóða økið framvið fjøruna við teir grønu og bláu geirarnar, sum verða lýstir sum eitt týdningarmikið eyðkenni fyri Fuglafjørð.

Bústaðarøkini eru fjølbroytt við ymsum støddum av bústaðareindum, har sosial burðardygd er raðfest. Grannaløgini, ið eru partar av uppskotinum, verða styrkt, fólk koma hvørjum øðrum við og trivnaður kann styrkjast innan og ímillum húsini.

Uppskotið dugir at leggja rúm ímillum verandi og nýggjar bygningar á ein varisligan men áhugaverdan hátt. Tað skapar eina heild, ið eggjar til uppihald, spæl og rørslu og økir um trivnað. Meira pláss er eisini lagt til bleytu ferðsluna, frá býarkjarnuni og niðan til vøllin og svimjihylin, vestureftir til sandin og eystureftir til smávinnuøkið.

Talan er ikki um eitt ovurstórt tal av nýggjum búeindum, tá samanborið verður við hini uppskotini, men tað er eingin forðing fyri at víðka bú-, tænastu- og vinnupláss enn meira í framtíðini.

Ferðslan á høvuðsvegnum verður tálmað av stein- ella flísaálegging, og tað kann hugsast at verða ein bati í mun til ferðina, sum í dag er ov høg.

Uppskotið vísir á eitt spennandi handils- og tænastuøki, sum verður kallað Larsenstorg, har bygningarnir og virksemið eisini er merkt av fjølbroytni til íbúðir og vinnuhølir.

Uppskotið er sett í rættan samanhang, og sýnist tí veruleikakent, tá hugsað verður um, hvat eyðkennir Fuglafjørð. Tað tykist lætt at arbeiða í stigum við hesum uppskotinum, tí arbeitt verður við at styrkja tað verandi, og tí er líkt til at batar kunnu síggjast og upplivast í nærmastu framtíð.

Uppskotið er eitt fyrimyndarligt grundarlag fyri víðari arbeiðnum at menna býin í framtíðini.



## 2. virðisløn, kr. 250.000

**Uppskot nummar:** 97531
**Uppskotsstillari: Henning Larsen North Athlantic**







Dómsnevndin hevur valt hetta uppskotið sum nummar 2, sum leggur dent á nýbygging og víðkan av býnum tá umræður nýtt lendi og bátahyl. Serliga dámar dómsnevndini væl hugskotið at styrkja maritima samleikan hjá Fuglafirði. Jaligt er, at ein nýggj ringrás verður skapað og knýtir saman Mentanarhúsið, eitt nýtt bryggjuøki, mentanardepil og eitt nýtt tún, nevnt Skarðstún.

Nýggj handilsgøta spennir seg frá Mentanarhúsinum til Skarðstún, niðanfyri høvuðsvegin. Skarðstún er eitt spennandi, opið og fjøltáttað torg við smávinnu, bryggjuhúsum og opnum uppihaldsøki við góðum sólargangi. Torgið hevur vesturskyn og lívd.
Dómsnevndin dámar væl, hvussu torgið, nevnt Skarðstún, er skipað, men sær ein vansa við at høgu bygningarnar kring túnið skilja økið sundur fram við fjøruni og minka um góðskuna fram við Piddasakaj. Dómsnevndin sær fyri sær, at hetta økið kundi verðið betri staðsett longur norði (eysturi).
Í handilsgøtuni eru handlar og íbúðir á báðum síðum. Bygningarnir sunnanfyri handilsgøtuna eru í 2-3 hæddum. Húsini í niðara borð eftir handilsgøtuni eru samanbygd og liggur gøtan tí helst í skugga part av degnum.

Fylt verður umleið 50 metrar út á fjørðin sunnanfyri Mentanarhúsið. Tað er í høvuðsheitum ætlað til parkering og nýbygging og ivast dómsnevndin í, um tað er nóg væl gagnnýtt. Til

dømis er eitt stórt øki sett av til parkering við besta sólargangi, sum kundi verið gagnnýtt betri.

Bústaðir eru staðsettir sum raðhús, ið verða nevnd bryggjuhús. Tey liggja kring bátahylin og havnarrúmið. Húsini eru í trimum hæddum, har niðasta hæddin er til smávinnu og ovastu hæddirnar til íbúðir. Bryggjuhúsini eru staðsett fyri at skapa lívd, men samstundis forða tey fyri útsýni millum bý og sjógv og skapa skuggarúm. Øll tykjast at vera lík í støðd, og ivast verður tí í fjølbroytni í bústaðarmøguleikum.

Á endanum av bátahylinum er nýggi mentanarbygningurin, Vitin, staðsettur. Hann kann verða savnandi fyri ymiskt nýtt og fjølbroytt mentanarligt virksemi og kann vera við til at styrkja samleikan í Fuglafirði. Tó er hann í vavi munandi størri enn verandi Mentanarhús, og ivast dómsnevndin í um hetta er ov stórt. Ein vansi kann vera, at hann tekur lív frá verandi miðbýi og mentanarstovnum.

Ferðsluviðurskiftini á høvuðsgøtuni eru viðgjørd við álegging og trøum, sum tálmar ferðsluni og skapar batar fyri fólk til gongu og á súkklu. Bleyt ferðsla verður leidd niðanfyri høvuðsvegin eftir nýggju handilsgøtuni.

# 3. virðisløn, kr. 150.000

**Uppskot nummar:** 65159
**Uppskotsstillari:** MAP Arkitektar



Dómsnevndir metir, at uppskotið sum heild hevur ein sterkan boðskap við nógvum spennandi hugleiðingum. Uppskotið skilur seg frá hinum við áhugaverdum og øðrvísi loysnum um ferðslu- og bústaðarviðurskiftum.

Uppskotið arbeiðir í høvuðsheitum við einari nýggjari uppfyltari oyggj. Hendan er í høvuðsheitum bilfrí og er stórur dentur lagdur á sosiala burðardygd, lívfrøðiligt margfeldi, felagsskap, rørslu og samveru.

Oyggin er bygd til at hýsa umleið 500 fólkum, og er tískil í vavi sum ein miðalstór føroysk bygd. Dómsnevndin sær vansar í tí, at tað kann gerast ein sjálvstøðugur býarpartur, heldur enn ein integreraður.

Ein fortreyt fyri oynna er, at grót fæst til vega frá gerð av parkeringstunli. Hetta kann tykjast sum ein andsøgn til annars góðu hugsanirnar um burðardygd.

Tilgongdin frá byrjan til verkætlanin er fult útbygt, tykist ógreið, og ivi er, um verkætlanin hevur stórvegis virði, fyrr enn hon er fullfíggjað.




Uppskotið leggur upp til at byggja uppí Mentanarhúsið og styrkja økið kring hetta. Dómsnevndin metir hetta vera jaligt. Eisini tykjast tey at viðgera økið við sandin við nærlagni við hóskandi virksemi til eitt nú skótar og havsvimjing.

Stórir tankar eru um at skilja tungu ferðsluna til ídnaðin frá býarrúminum gjøgnum ein umfarstunnil undir býin. Tó er talan um eina kostnaðarmikla verkætlan, sum Fuglafjarðar kommuna fær trupult við at fíggja.
Uppskotið vísir annars á álegging á høvuðsvegin, sum tálmar ferðsluni og skapar batar fyri fólk til gongu og á súkklu. Tó ber ikki til hjá bleytari ferðslu at ferðast allan vegin framvið fjøruni. Eisini arbeiðir tað við grønum vøkstri framvið høvuðsvegnum og Skarðsá.

Fjøran ynskist varðveitt í størsta mun, og tískil er bert ein farleið gjørd út á oynna. Hetta kann gerast ein vandi, tá umræður tilbúgvingarkrøv.

Sum heild er uppskotið eitt sindur torført at lesa og greina.

# Upplýsingar um kappingina:

## Slag av kapping
Hugskotskapping fyri innbodnum teknistovum, og kappingartreytir eru sambært treytunum hjá Arkitektafelag Føroya.

## Fyriskipari
Kappingin er útskrivað av Fuglafjarðar kommunu.

## Tíðarskeið fyri kappingina
1.februar - 24. mai 2024.

## Móttikin uppskot
3

## Dómsnevnd
Uppskotini vórðu dømd av eini dómsnevnd við hesi samanseting:

- *Dávur Juul, borgarstjóri*
- *Gudny Vang, býráðslimur*
- *Jóanis Erik Køtlum, kommunustjóri*
- *Lillian Jacobsen, leiðari fyri Teknisku deild*
- *Rønn Eliasen, leiðari fyri mentanardeildina*
- *Nina A. Arge, arkitektur*
- *Páll Holm Lave, arkitektur*

Skrivari hjá dómsnevndini hevur verið Sigurd Justinussen, býarplanleggjari frá ÍVF Senit.

## Kappingarsamskipan og -skrivari
Senit við Sigurd Justinussen hevur samskipað kappingina.
Tórálvur Weihe er kappingarskrivari fyri Arkitektafelag Føroyar (AF).

## Heiðurslønir
Upphæddin til heiðurslønir og innkeyp var 750.000,- DKK.

## Kappingargrundarlagið
Kappingargrundarlagið var kappingarskráin, og dwg fílar av Fuglafirði. Uppskotini hava ikki verið bundin av verandi byggisamtykt fyri økið.

## Dømingarfortreytir
Uppskotini eru dømd eftir góðskuni á heildarloysnunum fyri alt kappingarøkið, hetta í mun til loysnir innan ferðslu, sambinding, handils-, tænastu- og vinnulív, fjølbroytni og arkitekturpolitikk.

## Dømingartíðarskeið
Dómsnevndin hevði fundir og viðgerðir dagarnar 4.-5. Juni og 11.-14. juni 2024.

## Kappingarúrslit
1. heiðursløn, DKK 350.000,- Uppskot 30684
2. heiðursløn, DKK 250.000,- Uppskot 97531
3. heiðursløn, DKK 150.000,- Uppskot 65159

## Framsýning og almannakunngerð
Almannakunngerð av niðurstøðu hjá dómsnevnd 18. juni 2024 kl. 17.
Uppskotini verða sýnd fram í Fuglafirði 18. juni 2024.

Fuglafjørður, tann 14. juni 2024

**Dómsnevnd:**

Dávur Juul

Gudny Vang

Jóanis Erik Køtlum

Lillian Jacobsen

Rønn Eliasen

Nina A. Arge

Páll Holm Lave

Dómsnevndarálit
Ritstjórn: ÍVF Senit
Forsíðumynd: Senit
Aðrar myndir: Uppskotsstillarar
Uppseting: Senit
Útgávan er at finna hjá Føroya
Arkitektafelag:
www.ark.fo